# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nýtið vit og skil

»Veðrið má sær sjálvum ráða«. Soleiðis verður ofta tikið til, tá veðurgudarnir ikki eru við, og tað var ein veruleiki, sum fótbóltsspælarar kring landið máttu taka til eftirtektar, tá allir dystirnir í fremstu deildunum vórðu útsettir farna vikuskiftið.

Tað er so tað, sum tað er. Men av øllum londum í heiminum máttu vit júst her í Føroyum vita, at tá veðurgudarnir ikki vilja, so er ikki tað stóra hjá okkum á fold at gera.

Og tí var tað merkisvert, at tað skuldi taka somikið langa tíð, áðrenn dystirnir á ymsu plássunum vórðu avlýstir. Leygardagin máttu venjarar og spælarar hjá VB/Sumba og TB soleiðis á rukkuferð til Havnar, har dystir teirra kortini vórðu avlýstir. Nakað sum eitt nú VB/Sumba fekk at vita bara 10 minuttir eftir at Smyril hevði loyst.

Og longu leygardagin vistu allir klaksvíkingar av, at ikki var spælandi á vøllinum sunnudagin. Men kortini skuldi tíðin ganga fram til á miðdegi sunnudagin, áðrenn avlýsingin kom.

Eitt er, at tað sjálvandi eru dómararnir og fótbóltsmyndugleikarnir annars, sum gera av, nær dystir skulu avlýsast ella ikki. Men vanliga vitið og skilið hjá føroyinginum er væl somikið gott, tá tað ræður um veðrið, at hetta eisini eigur at verða tikið til eftirtektar. Ella við øðrum orðum, so skuldi altso verið óneyðugt at eftirkanna páhaldið, um klaksvíkingar siga, at ikki er spælandi fyri kava á plenuni. Sum alternativ kundu FSF-umboðini eisini hugt at vevmyndunum á portalinum, ella kanska eftir myndini, sum Norðlýsið hevði lagt á netið sunnumorgunin.

Sum formaðurin í kappingarnevndini so væl segði tað á Rás2 sunnudagin, so skulu avgerðir sjálvandi ikki takast í óðum verki, bert tí kavi órógvaði eitt vikuskifti í apríl í 2008. Men ein læra má øllum førum vera, at boð um avlýsingar verða givnar alt fyri eitt, tá veðurgudarnir geva somikið greið tekin, sum teir gjørdu tað hesa ferð.

**Sosialurin**

## Johan Dahl man hava rætt

**ROLF GUTTESEN**

rg@geogr.ku.dk



**The Economist skrivar: "Denmark, meanwhile, avoided the storms altogether"**

Eitt orðaskifti hevur verið millum Johan Dahl og Kjartan Hoydal, nú hetta landsstýrið ætlar at yvirtaka fíggjareftirlitið. Nógv spyrja: Til hvørja nyttu?

Satt at siga er tað ringt at fáa eyga á nakra nyttu í hesum forskrúvaða projekti. Búskaparfrøðingar, bankafólk og onnur ávara. Tað kemur at kosta, og kann koma at kosta ógvuliga dýrt.

**Hoyrast ávaringarnar ikki?**

Einasta argumentið tykist at verða nationalistiskt. Líka mikið hvat, ið tað kostar, og hvørjar katastrofalar fylgjur tað kann fáa, so skal tað yvirtakast. Enn ein innantóm, vandamikil kulissa skal stáplast upp.

Hoydal leggur upp til, at fíggjareftirlitið var ein orsøk til kreppuna í 90-unum.

Dahl framhevjar, at fíggjareftirlitið var og er vælvirkandi, álítandi og ger eitt gott arbeiði. Dahl sigur, at orsøkin til kreppuna skula vit finna millum føroyskar politikarar, sum tá høvdu ábyrgd, og ráðgevarar teirra, millum aðrar Hoydal sjálvan. Skeivar politiskar avgerðir, ella ongar, kunna drepa eitt samfelag.

**Rósur til danska fíggjareftirlitið**

Kenda eingilska vikublaðið "The Economist" hevur tann 22. mars 2008 á síðu 82 eina grein "Economic focus, History Lesson," sum viðger kreppuna, ið tekur seg upp í dag í USA og Europa. Greinskrivarin spyr, um vit kunnu læra nakað av søguni. Hann kemur fram til, at fleiri lond eisini vóru í kreppu í 90-unum.

Bæði Noreg, Svøríki og Finland verða nevnd. Har gekk tað eisini hart fyri seg. Tað var tá, at norsk og svensk valuta minkaðu so nógv í áliti og virði, at danska krónan knappliga var nógv tann sterkasta í Norðanlondum.

**Hvi?**

Jú, tí danska lóggávan á økinum, og harvið danska fíggjareftirlitið, var tað besta. "The Economist" skrivar: "Denmark, meanwhile, avoided the storms altogether because of stricter capital rules – preventions better than cure."

Leysliga umsett:

"Danmark slapp púra undan illveðrinum (kreppunum), tí tað hevði strangari reglur fyri kapitalinum (pengaskipanini) – betri fyrivarin enn eftirsnarin"

**Ikki allir føroyingar vilja læra av søguligum mistøkum**

Tað eru smáir menn, sum í dag leggja eftir Fíggjareftirlitinum og geva tí skyldina fyri kreppuna í 90-unum. Smáir menn, sum til dømis eisini vóru við til at kontstruera "Ráfiskagrunnin," sum vísti seg at verða ein drepandi konstruktión. Grunnurin, sum drenaði landskassan, og drap alla vanliga fornuft í fiskivinnuni.

Fólk kunna sjálv meta. Er málið eitt vælvirkandi, opið samfelag - ella er tað at stápla nakrar innantómar kulissur upp, sum kunna skrambla saman hvørja løtu?

## Móðurmálið má mennast

**JÓNLEIF JOHANNESEN**



Teir gløggu grúkar, ið søkja á Fróðskaparsetrið, eiga at fáa møguleikan at styrkja málið.

Eisini eiga vit at grava góðar gøtur til teirra, sum vilja náa doktaraheiti innan føroyskt málsøki. Føroyskt er eitt lítið mál og krevur tí at verða borið á lógvum. Vit eiga at fjálga um málið, men at seta málskúlar á stovn til útlendingar og krevja, at teir nærum megna at skipa Kjartanstátt er ikki mennandi.

Útlendingar koma higar at granska. Flestu verða bert stutta tíð. Aðrir seta vónandi búgv og fáa eftirkomarar. Tað eru eftirkomararnar, vit skulu læra gott føroyskt mál. Javnaðarflokkurin vil nógvar batar á málsliga økinum. Nakrir teirra eru settir í verk. Eitt nú meiri føroyskt tímar til yngru flokkarnar. Eisini vil Javnaðarflokkurin menna føroyskt barnatiltar. Barnabøkur, teknifilmar o .a . eigur í størri mun at finnast á føroyskum máli.

Undirvísingartilfar má áhaldandi mennast. Her verður serliga hugsað um serføroyskt tilfar, um føroyska mentan og føroyska náttúru.

Gloymið ikki at styrkja hetta økið. Her fæst gagn fyri og til hvørt oyra.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.